**FØROYA STUDENTASKÚLA OG HF-SKEIÐ**
Hoydalar • Tórshavn • Føroyar
Tlf. +298 312973 • Fax +298 318624

Frá 1. august 2003 at rokna verða **7-9** ársvikariatir leys at søkja í hesum lærugreinum:

**lívfrøði, donskum, enskum, evning, alisfrøði, føroyskum, søgu, ítrótti, støddfrøði, samfelagsfrøði og týskum**

treytað av faksamansetingini hjá umsøkjarunum. Umsøkjarar eiga at gera vart við, hvørjar aðrar lærugreinir teir hava undirvísingarførleika í. Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august í 2003 – í viku 33.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á, at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo.

Umsókn á oyðublaði frá YF ella GL verður stílað til Føroya Landsstýri, Mentamálaráðið, Tórshavn, men verður sent til:

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
**att.: Mads Winther, rektari**
**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
**Føroyar**

í seinasta lagi 6. mai 2003.

Avrit av próvtøkuskjølum ella útskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.

# Opið um páskirnar

**Skírisdag ............. STONGT**
**Langa fríggjadag ...... STONGT**

**Leygardagin 19. apríl er opið sum vanligt**

**1. Páskadag ........... STONGT**
**2. Páskadag ........... STONGT**

**Frá týsdegnum 22. apríl er aftur opið sum vanligt.**

**Pf. Frants Restorff**
Tórsgøta 13
Tlf. 31 10 60
og spyr eftir Louise.

**frants restorff**

# Skrivstovulærlingur

Vit sóknast eftir lærlingi innan fyrisiting til skrivstovu okkara.

**Umsøkjarin skal:**
- hava góð samstarvsevni
- hava teldukunnleika
- verða nærlagdur og røkin
- verða væl fyri í enskum máli
- verða skrivliga væl fyri á føroyskum

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Gunnbjørn Joensen, stjóra. Tlf. 422503 ella t-post: gunnbjor@thor.fo.

Umsóknin saman við avritum av prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til:

**P/F THOR**
Bryggjan 5
420 Hósvík

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 12. mai 2003.

***P/F THOR** er eitt felag, sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni og ymiskt annað virksemi í hesum sambandi. Víst verður til heimasíðu okkara: www.thor.fo.*

# Samfelagsfundir í Klaksvík á Hvítusunnu

Skrá yvir fundirnar verður lýst seinni.

**Samkoman í Betesda**

# Ársaðalfundur

Arbeiðskvinnufelagið Fjallbrúður hevur ársaðalfund í Fjallbrúður mánakvøldið 28. apríl kl. 19.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

Aftan á verður eykaaðalfundur.

**Fjallbrúður**

# Stongt vegna feriu

Sjúkrakassin verður stongdur vegna feriu frá 22. apríl 2003 til 29. apríl 2003 og frá 8. mai 2003 til 19. mai 2003, nevndu dagar íroknaðar.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis**

# Hús í Vági

Hús á Lágabø í Vági til sølu.
Prísuppskot : 450.000 kr

**Tlf. 373874**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3536
**Navn:** P/F Kongshavn
**Adressa:** Kongshavn 1, 600 Saltangará
**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 24.03.2003
**Viðtøkudato:** 24.03.2003
**Kapitalur:** Kr. 1.000.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 279.278,75 til kurs 400 og kr. 720.721,25 í øðrum virðum til kurs 400.
**Stovnarai:** P/F Beta, 600 Saltangará (P/F 270)
**Nevnd:** Ragnar S. Olsen, Garðavegur 14, 660 Søldarfjørður (formaður), Olaf Olsen, Leitisvegur, 625 Glyvrar, Hans Andrias Dam, Rektaragøta 10, 100 Tórshavn, Líggjas í Bø, Skáltavegur 21, 700 Klaksvík og Napoleon Jacobsen, við Langanes, 625 Glyvrar.
**Stjórn:** Olaf Olsen, Leitisvegur, 625 Glyvrar.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at landa og avgreiða fisk og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 14. apríl 2003*

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3537
**Navn:** Sp/f Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen
**Adressa:** J. Paturssonargøta 18, 100 Tórshavn
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 10.04.2003
**Viðtøkudato:** 10.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Hermund Jacobsen, Peturstrøð 22, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Hermund Jacobsen, Peturstrøð 22, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
**Grannskoðari:** Óli Regin Hansen, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka ráðgevingar- og grannskoðaraarbeiði og annað virksemi í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

*Skráseting Føroya tann 14. apríl 2003*

*Kristin Balle*

# Søkt verður eftir hølum

Søkt verður eftir hølum til leigu á Skálafjørðinum, stødd áleið 60 til 70 kvm.
Hølini eru ætlað at virkað sum tilhaldsstað, og skulu vera í góðum standi.

Hava tit hesi hølir til taks, so setið tykkum í samband við tlf. 226121 og fá nærri at vita.

# Hús í Klaksvík til sølu

Um hóskandi boð fæst, eru húsini Mylnugøta 23 til sølu.

Áhugaði kunnu ringja

**Tlf. 456350 ella 216350**



## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 11. apríl 2003, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54 grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Bingju- og móttøkuplássið við Kommunalu brennistøðina**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Landsstýrismannin í umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Falkavegur 6, 2. hædd, FO-100 Tórshavn, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Heilsufrøðiligu starvsstovuni, www.hfs.fo

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan**

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

Ógloymandi borðhald og
# SPENNANDI ÚTFERÐIR
*10. mai*

Vit stíla fyri:
· Útferð
· Stórari "fjalla"-buffet við meira enn 30 ymsum rættum
· Dansi
· Vistarhaldi
· Flutningi

***Eitt gott tiltak - bæði fyri náttúrufólk og fólk í veitslulag -***

Legg saman flutning, útferð, "fjalla"-buffet, gisting og dans og tú fært:

eina ógloymandi vikuskiftisútferð
***fyri 695,-***
í dupultkamari
v/ gisting og flutningi úr Havnini

Vel ímillum hesar útferðir:
- Gongutúr niðan á Egg
- Gongutúrur til Gásadals
- Gongutúr til Bøsdalafoss
- Siglitúr um Tindhólm (100,- kr. eyka)

*Allir túrarnir eru við ferðaleiðara*

**Twilight**
undirhalda og spæla til dans

**Útferð, borðhald og dansur**
***325,-***

**Dansur *125,-***

Útferðirnar byrja kl. 13.00
Borðhaldið byrjar uml. kl. 19.00
Dansur er frá kl. 23.00
***Bíleggið í góðari tíð***
***á tel 33 29 55***
***- avmarkað atgongd -***

***Eisini fyriskipa vit útferðir***
***fyri virkir og feløg***
***Ring og hoyr nærri!***

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo

team85

**Barnagarðurin á Velbastað sóknast eftir**
# hjálparfólki

Sóknast verður eftir tímaløntum hjálparfólki at arbeiða mánadag og hósdag á stovu við 11 børnum. Starvið er 16 tímar um vikuna. Harumframt er arbeiðsuppgávan, at vera avloysari í barnagarðinum.

Væntandi verður møguleiki fyri føstum starvi eftir summarfrítíðina.

Ynskiligt er, at tú hevur arbeitt á dagstovni áður.

**Umsókn**
Umsóknir skulu vera Barnagarðinum í hendi seinasta lagið 28. apríl.

Nærri fæst at vita á tel 328121. Spyr eftir Hannu Jacobsen, leiðara ella Elsu Jacobsen, varaleiðara.

**KIRKJUBØAR KOMMUNA**

team85 • 358000

# Lærlingur

Ert tú opin, fyrikomandi og ágrýtin, er hetta kanska rætta læruplássið fyri teg. Vit søkja lærling at byrja skjótast til ber.

Tú fært eina áhugaverda útbúgving innan málingahandil. Í lærutíðini verður skift ímillum starvsvenjing í handlinum og skúla í Danmark.

Lærutíðin er 3 ár um tú hevur FHS prógv og 2 ár um tú hevur HH prógv.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal sendast til

NORÐOYA LITBÚÐ
Klaksvíksvegur 89 - FO-700 Klaksvík - Tel 457300 - Fax 457891

# Fólk
## til framleiðsluna

Til framleiðslu okkara av termorútum søkja vit eftir fólki.

Er tú arbeiðssamur/som og fyrikomandi so kunnu vit bjóða eitt arbeiði við nýggjum avbjóðingum í einum spennandi umhvørvi.

Fyrimunur er um tú hevur koyrikort, men tó eingin treyt.

Um hetta hevur tygara áhuga, send so eina skrivliga umsókn, áðrenn 25. apríl.

**P/F Føroya Termovirki**
**Sundsvegur 8**
**100 Tórshavn**
**mrk.: Umsókn**

team85

FTV GLAS
FØROYA TERMOVIRKI

# Vakstrarhús til sølu

Vakstrarhúsið inni í Dølum Kirkjubø – húsið er 1200 m².

Áhugað kunnu venda sær til

**Vakstrarhúsið inni í Dølum Kirkjubø**
Tlf. 211853 – 316653

**IRAK HJÁLPIN**

**Giro 77011**
**ella konto hjá okkum í peningastovnunum**

**REYÐI KROSSUR FØROYA**